# Vinnararnir í Skotlands-kappingini eru funnir

**Føroyingar fara nú aftur at ferðast meira til Skotlands, nú Norrøna fer at sigla regluliga til Scrabster í summar**

KAPPING
*Jonhard Hammer*



*Jákup Sverri Kass, søluleiðari hjá Smyril Line, var í Miðlahúsinum og fann vinnararnar millum tey mongu, sum høvdu sent inn til kappingina*
Mynd: Jens Kr. Vang

Smyril Line fer í summar at senda hópin av føroyingum og útlendingum til Skotlands í feriu. Norrøna fer at sigla regluliga til Scrabster, og tað gevur fólki nýggjar møguleikar at ferðast til Skotlands.

– Vit hava fingið heilt fitt av fyrispurningum og bíleggingum til Skotlands, sigur Jákup Sverri Kass, søluleiðari hjá Smyril Line.

– Vit á Smyril Line eru greið yvir, at tað tekur tíð at uppbyggja ein nýggjan marknað. Av tí at føroyingar ikki hava havt beinleiðis sjósamband til Skotlands síðan miðskeiðis í 90´unum, eru nógv ikki greið yvir allar teir fantastastisku møguleikarnir sum rúmast í Skotlandi, sigur hann.

– Vit ynskja at føroyingar fáa møguleikan fyri at fáa eina bíliga familjuferð í summar, og har er Skotland eitt upplagt mál. Skotland hevur frálíkar familjudeplar, nógv til børnini, strendur, slott, stórbýir og annað. Vit vilja avgjørt mæla fólkum til at fara til Skotlands og royna nakað nýtt, sigur Jákup Sverri Kass.

### Vinnarar

Í sambandi við serblað um Skotland í Sosialinum herfyri var skipað fyri kapping um ferðir til Skotlands. Spælt var um tríggjar familjupakkar frá Smyril Line, sum eru fyri fýra fólk í bili.

Jákup Sverri Kass dró vinnararnar, og millum tey mongu, sum høvdu sent putlispælið inn, vórðu hesi trý drigin úr rúgvuni:

Esther Sørensen
Berjabrekka 55
100 Tórshavn

Jens Andrias Dam
J. Paturssonargøta 26
100 Tórshavn

Bodil Holm Jacobsen
Millum Gilja 15
188 Hoyvík

Vinnararnir fáa gávukortini sendandi. Vit ynskja teimum tillukku og góða ferð.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Hvassur vindur ella skrið av vestri, seinnapartin minni vindur av útnyrðingi. Ælingur, partvís vátakavi, men eisini sólglottar. Hitin millum 2 og 5 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Upp í hvassan vind av vestri og regn. ella vátakavi, um kvøldið upp í skrið av norði og kavaælingur. Hitin millum 1 og 4 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Hvassur vindur ella skrið av norði og kavaælingur. Hitalagið millum 0 og ÷3 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin upp í hvassan vind av norði og kavaælingur, men týsdagin minkar hann vindin niður í lot av ymsum ættum, turt og sólglottar. Hitin um frostmarkið, men týsdagin lýggjari.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -12 |
| Nuuk | -7 |
| Qaqortoq | -2 |
| Ammassalik | 1 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 4 |
| Seyðisfjørður | 5 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 8 |
| Aberdeen | 11 |
| London | 14 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 7 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 9 |
| Keypmannah. | 13 |
| Helsinki | 1 |
| Moskva | 2 |
| Berlin | 12 |
| Warzawa | 8 |
| Kiev | 3 |
| Bukarest | 10 |
| Paris | 12 |
| Madrid | 14 |
| Róm | 16 |
| Malorca | 17 |
| Athen | 13 |
| Malta | 14 |
| Tunis | 14 |
| Beijing | 11 |
| New Dehli | 17 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | -- |
| New York | 10 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 25 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 33 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 27 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 1000 hPa. í landnyrðing úr Føroyum fer í landnyrðing. Eitt annað lágtrýst, 994 hPa. við Hvarvið fer eystureftir.




**Í dag:**
Lágtrýstið við Føroyar fer eystureftir og brúgvalagið haðani fer í landsynning. Eitt annað lágtrýst sunnan fyri Hvarvið fer eystureftir og dýpist. Tað fer væntandi um Føroyar leygarkvøldið og hevur kulda við sær.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 11/3 kl. 06[00]– 12/3. 06[00]. Hitin í gjár: 6,7°
Minsti hiti máldur í mars: -8,7° - Mesti hiti máldur í mars: 12,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 12/3 kl. 06[00]– 13/3 kl. 06[00]
Avfallið higartil í mars: 80,0 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

7. mars – Mánin longst frá jørðini
12. mars – Seinna kvarter
19. mars – Tendring/mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 15. Mars | 03.23 | 15.49 | 02.23 | 14.49 | 02.38 | 15.04 | 05.23 | 17.49 | 06.23 | 18.49 | 01.38 | 14.04 | 00.38 | 13.04 | 03.38 | 16.04 | 04.38 | 17.04 | 03.08 | 15.34 | 04.23 | 16.49 |
| 16. Mars | 04.13 | 16.37 | 03.13 | 15.37 | 03.28 | 15.52 | 06.13 | 18.37 | 07.13 | 19.37 | 02.28 | 14.52 | 01.28 | 13.52 | 04.28 | 16.52 | 05.28 | 17.52 | 03.58 | 16.22 | 05.13 | 17.37 |
| 17. Mars | 05.00 | 17.24 | 04.00 | 16.24 | 04.15 | 16.39 | 07.00 | 19.24 | 08.00 | 20.24 | 03.15 | 15.39 | 02.15 | 14.39 | 05.15 | 17.39 | 06.15 | 18.39 | 04.45 | 17.09 | 06.00 | 18.24 |
| 18. Mars | 05.46 | 18.09 | 04.46 | 17.09 | 05.01 | 17.24 | 07.46 | 20.09 | 08.46 | 21.09 | 04.01 | 16.24 | 03.01 | 15.24 | 06.01 | 18.24 | 07.01 | 19.24 | 05.31 | 17.54 | 06.46 | 19.09 |
| 19. Mars | 06.31 | 18.54 | 05.31 | 17.54 | 05.46 | 18.09 | 08.31 | 20.54 | 09.31 | 21.54 | 04.46 | 17.09 | 03.46 | 16.09 | 06.46 | 19.09 | 07.46 | 20.09 | 06.16 | 18.39 | 07.31 | 19.54 |

Brúðarlín
v/ Anniku Gaard
Fagralíð 22
Tlf./Fax. 314281
Brúðar- og brúðargentukjólar við tilhoyri til leigu
Nýggir kjólar kunnu útvegast
www.brudarlin.com




- altíð eitt tiltak miðlahúsinum
Tiltøk í mars
16. mars
Kyndil - bókframløga
kl. 16
17. mars
Sinnibati aðalfund
kl. 15
24. mars
Aglow
25. mars
Det Blå Danmark
28. mars
Heilsufrøðiliga
Starvsstovan